TILTØK

Missiónsvikan í Bø
Missiónsvikan í Bø byrjar í kirkjuni hósdagin kl. 20 har Oddmar á Steig talar og manskórið í Vágum syngur. Fríggjadagin talar Jóan Petur Johannesen og Ungdómskórið syngur, drekkamunnur verður aftaná møti.
Leygardagin talar Jógvan Steintún og Magni Christiansen syngur.
Sunnudagin Gudstænasta við altargangi, David Johannesen prædikar. Familjumøti kl. 15 Jan og Nancy luttekur. Barnakórið í Bø syngur, kl. 18 Møti har Ingolf Johannesen talar og Streingjakórið syngur og vitnar.

Keldan, Skálafirði
Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti við Paula Høj, kl. 11 Barnamøti, kl. 19 Sang og Evangel. møti við Theodor Petersen og døtrum.
Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

Betania, Skopun
Hósdagin kl. 19 koma tey ungu saman. Vælkomin í Betania.

Missiónshúsið í Skopun
Missiónsvikan heldur fram kl. 20 Møti v/ Malberg Olsen, Strendur, trio á Sandi syngur. Fríggjakvøldið kl. 20 Møti v/ Kajberg Davidsen og Sigfred Johannesen, Jónhilda og Gulak Hansen syngja.
Leygarkvøldið kl. 20 Møti v/ Árna Kjærbæk, Vági, Jónhilda og Gulk Hansen syngja.
Innsavnan.
Sunnudagin kl. 12 Gudstænasta v/ altarg., Jákup R. Hansen, prestur prædikar, kl. 15 Familjumøti, Krist-Bjørg og Molly syngja, kl. 18 Møti v/ Thomas Juul Askham, Jónhilda og Gulak syngja. Innsavnan. Bønarløta er hvørt kvøld 1/2 tíma áðrenn møtini. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Betesda í Norðoyggjum
Fríggjakvøldið kl. 20: Kristnastovuvinir hittast til »fríggjakvøldssamkomu« í kjallaranum í Betesda. Øssur og Susan vera við.
Sunnukvøldið kl. 18 talar Øssur Berghamar.

Soli Deo Gloria
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Preben Hansen.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Páskastevna verður í Skálanum frá skírishósdegi.

Aglow, Klaksvík
Møti verður á Soli Deo Gloria leygarkvøldið kl. 20. Allar kvinnur eru vælkomnar.

Getsemane, Klaksvík
Mikukvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Fríggjakvøldið kl. 20.30 Hugnakvøld fyri ung.
Sunnudagin kl. 18 Møti. Tú ert hjartaliga vælkomin.

KFUM & K í Klaksvík
Hósdagin kl. 20.30 Gospelkórið »Gleði venur«
Fríggjadagin kl. 21 Opið hús.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarmøti, kl. 18 Møti við Silverius Jacobsen, kl. 21 Ungdómsmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Skúlin við Ósánna
Evangel. møti verður hóskvøldið kl. 19.15-20.15 við Karen J. Lund og Daisy Ames. Í Jesu navni eina boða vit evangeliið, tað sum var frá byrjan. Øll eru vælkomin.

Missiónshúsið í Porkeri
Missiónsvikan heldur fram við møti í kvøld kl. 20. Tey úr kórinum av Tvøroyri syngja og tala.
Fríggjakvøldið kl. 20 talar Niels Jacob Nielsen, trúboðari og Knút Larsen úr Fuglafirði. Kórið úr Porkeri syngur.

Betania, Porkeri
Møti verður í kvøld kl. 20, Levi Joensen og aðrir tala.

Frelsunarherurin, Vágur
Í kvøld kl. 20 Streingjakórvenjing.

Tilhaldið
í Tórsgøtu 21, tlf. 316491
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
Mánadagur 23. februar
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10.15-18 Ítriv
kl. 14-18 Kortspæl, telving, landastrok og onnur spøl. Tilmelding til døgurðan miku- og fríggjadagin tlf. 316491
Føðingardagur og ársfundur verður 12. mars. Val verður av tveimum nevndarlimum. Øll uppskot eru vælkomin í postkassan í Tilhaldinum.
Týsdagur 24. februar
kl. 10-11.30 Sangur, F. og B. Samuelsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.
kl. 14 »Ábyrgd fyri egnari heilsu« Heilsugóður kostur, Jóhanna á Tjaldraflotti. Framsýning verður á Ólavsøku av barnamyndum frá 30'- og 40'unum og brúðarmyndum frá 30'-60'unum. **Allar myndir eru vælkomnar.**
Mikudagur 25. februar
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði. Høvi er at koma sum gestur. Tilmeld. tlf. 316491
kl. 15 Túrur
kl. 17-21 Opið hús
Hósdagur 26. februar
kl. 10-110.30 Fimleikur, Sonja Danielsen.
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
Fríggjadagur 27. februar
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði. Høvi er at koma sum gestur. tilmelding mánadag tlf. 316491
kl. 13-17 Opið hús

Tað er altið ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

Losjan í Havn Tinghúsvegur 18
Fríggjadagin kl. 15 hittast tilkomin og eldri til hugna.

Felagið Tórshavn – gongutúrur
Sunnudagin 29. februar verður gongutúrur av Oyggjarvegnum til Leynar eftir bygdargøtuni. Farið verður av Kunningarstovuni kl. 10.30. Lættur túrur. Havið heit og góð gonguklæðir og drekkamunn við. Tilmelding.

Vágs Pensionistafelag
Vágs Pensionistafelag – felagið fyri pensionistar í Suðuroyar sunnaru helvt – hevur limafund kl. 19.00 hvønn seinasta mánadag í hvørjum mánaða. Ymiskt áhugavert er á hvørjum fundi, har tú eisini fært drekkamunn við bollum og køkum. Fundirnir verða hildnir í hugnaligu hølunum hjá Vágs Matmøðrafelag. Allir pensionistar og øll omanfyri 60 ár eru vælkomin. Gerst limur í Vágs pensionistafelag.

Tilhaldið Hugnin í Sandoynni
Tilhaldið í Sandoynni er opið mánadag og mikudag frá kl. 14-17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Mánadagin 23. februar
Vit fara heim til Kristinu at fáa drekka og føstulávintsbollar
Mikudagin 25. februar
3. brot úr Lognbrá eftir Heðin Brú verður lisin.

80 ÁR

Fríggjadagin 27. februar fyllur Torkil Beder prestur, Fuglafjørður, 80 ár. Dagurin verður hildan saman við familjuni.

29. februar verður Noomi Solmunde, Søldarfjørður, 80 ár. Dagurin verður hildin í Elim í Søldarfirði frá kl. 17.00.

70 ÁR

Týsdagin 24. februar fylti Ragnhild Olsen í Fuglafirði 70 ár. Dagurin verður hildin í Felagslonini í Fuglafirði leygardagin tann 28. februar frá kl. 19.00.

BRÚDLEYP

Leygardagin 28. februar giftast Paula McGavin og Ragnar Eysturdal Magnussen. Vígslan verður í Vesturkirkjuni kl. 11.00. Tey, ið vilja heilsa upp á brúðarparið, eru vælkomin á Reynsgøtu 17 á Argjum aftaná kl. 18.00.

HEILSANIR

Góða Ninna
Hjartaliga tillukku við degnum í dag.
Heilsan Vagn

Hyggji her dreingir
Hesar eru akkurát blivnar 19 og 20 ár. Tillukku við døgunum. Vit gleða okkum til ballið.
Heilsan E & M

Góði Samuel
Yillukku við 4 ára føðingardegnum. Her er tú cool. Jesus pápi signi teg.
Bestu heilsanir omma og abbi í Smærugøtu 15

Góða fitta Elisabet
Hjartaliga tillukku við tínum 6 ára føðingardegi í dag. Nú ert tú ein stór genta.
Allarbestu heilsanir frá babba og Beintu

Góði Jógvan
Hjartaliga tillukku við 8 ára degnum í dag. Takk fyri at tú ert so góður við meg.
Ynskja vit øll Sølvi

Góða fitta Poula
Hjartaliga tillukku við 4 ára føðingardegnum 25. febr.
Ynskja mamma, babba, Tummas og Einar

Góða langomma
Takk fyri ein góðan føðingardag 15. februar, Vit eru so góð við teg.
Ásfinnur, Jógvan og Sølvi

Góði langabbi
Hjartaliga tillukku við 99 ára føðingardegnum 27. februar. Vit gleða okkum at koma í Kvinnufelagshúsið fríggjakvøldið.
Ásfinnur, Jógvan og Sølvi

Góða fitta Asta Sofía
Hjartaliga tillukku á 3 ára føðingardegnum. Eisini heilsa til Dávur og Mikal. Jesus pápi signi framtíð tykkara.
Kærastu heilsanir frá ommu og abba á Sandi

Góði elskaði Tóri
Hjartaliga tillukku á 1 ára føðingardegnum.
Ynskir Birgit mostir

Góði elskaði Tóri
Hjartaliga tillukku við 1 ára føðingardegnum. Gott, at vit eru tveir, ha?
Heilsan Rani

Fremst frá vinstru: Beinta Olsen, Klaksvík. Hanna Øregaard, Klaksvík. Linda Henriksen, Tórshavn. Annika á Marknagili, Klaksvík. Asta Højgaard, Klaksvík. Ásvør Dam Lassen, Klaksvík.
Í miðjuni frá vinstru: Jenny Kastalag, lærari, Jutta Hansen, lærari, Paulina Eliasen, lærari. Anna J. Hvidbro, Klaksvík. Ebba Mortensen, Klaksvík. Morid Simonsen, Saltangará. Maria Hansdóttir Tausen, Saltangará. Sunrid Mørkøre, Klaksvík. Herdis Ellingsgaard, Strendur. Alma Djurhuus, Strendur. Jóhanna á Tjaldrafløtti, leiðari. Elisabeth Akursmørk, lærari.
Aftast frá vinstru: Emi Thomsen, Skopun. Ragnfrið Nord Olsen, Rituvík. Anita Mikkelsen, Klaksvík. Hanna Guttesen, Tórshavn. Malan Hansen, Klaksvík. Gunnvá Dragaberg, Klaksvík. Birgitta Simonsen, Klaksvík. Petsy Norðberg, Strendur.

Skúlin við mongu møguleikunum

Fríggjakvøldið var samkoma á Húsarhaldsskúla Føroya, har 21 ungar kvinnur fingu handað prógv. Umframt árliga húsahaldsskeiðið, bjóðar skúlin eisini ymisk áhugaverd viku- og vikuskiftisskeið

HÚSARHALDSSKÚLIN
Rúna Sivertsen
runa@sosialurin.fo

Nú árliga húsarhaldsskeiðið er av, lýsir Húsarhaldsskúlin við fjølbroyttum viku- og vikuskiftisskeiðum.

Jenny Kastalag fer at hava vikuksiftisskeið í at seyma vest og buskur til føroyska búnan, og Jutta Hansen fer at hava skeið í at tekna mynstur og brodera til føroysku klæðini.

Í nøkur ár hevur skúlin havt klænkiskeið, og í ár verður aftur møguleiki at læra um heilsugóðan kost.

– Tað er umráðandi, at vit eru meira tilvitað um kostin og gera okkum greitt, at vit í stóran mun hava ábyrgd av egnari heilsu, sigur Jóhanna á Tjaldrafløtti, leiðari á Húsarhaldsskúlanum.

Saman við Elisabeth Akursmørk leiðir Jóhanna skeiðini, ið snúgva seg um matvørureinføri og heilsugóðan mat.

Jóhanna brennir fyri, at skúlin eisini skal verða brúktur til heilsufremjandi undirvísing. Eitt nú nevnir hon, at skúlin kundi verið nýttur til diabetisskúla.

Tað var ikki smávegis næmingarnir á Húsarhaldsskúlanum hevdu gjørt burt ur úr fráfaringarløtuni fríggjakvøldið.

Foreldur og familja vórðu boðin til kalt borð, og borðreitt var við alskyns rættum.

Røður vóru hildnar, og Morid Simonsen og Maria Hansdóttir Tausen úr Saltangará spældu floytu. Eisini var møguleiki at síggja handarbeiðið, sum genturnar høvdu gjørt á skeiðnum.

Heini á Markangili segði nøkur orð á fráfaringarløtuni á Húsarhaldsskúla Føroya fríggjakvøldið

Morid Simonsen og Maria Hansdóttir Tausen úr Saltangará spældu floytu

Mynd: Bárður Lydersen

HAVNAR BIO
Tlf. 31 19 56
www.bio.fo

Hósdagin 26.02. kl. 18[30]
Hósdagin 26.02. kl. 20[30]

Hósdagin 26.02. kl. 22[30]

Billettprísur: 45,- kr.
Hósdagin 26.02. kl. 16[30]

Billettprísur: 65,- kr.
Hósdagin 26.02. kl. 17[30]

Billettprísur: 75,- kr.
Hósdagin 26.02. kl. 19[30]
– *Seinasta sýning*

Hósdagin 26.02. kl. 22[45]
– *Seinasta sýning*

KOMANDI FILMUR

Frumsýning
Fríggjadagin 27.02.

Stórt úrval av DVD-filmum til sølu